## Kina heldur ikki COP15-samtyktina

Amerikanska stjórnin vil vera við, at Kina og fleiri av teimum stóru menningarlondunum royna at skáka sær undan veðurlagsfráboðanini, sum bleiv samtykt á toppfundinum í Keypmannahavn í desember. Amerikanski samráðingarleiðarin í veðurlagsmálum, Todd Stern, sigur, at Kina, India, Brasil og Suðurafrika royna miðvíst at avmarka týdningin av fráboðanini. Todd Stern ávarar Kina og hini londini ímóti at velja tað lætta burtur úr fráboðanini og at vraka tann torføra partin.



## Mótmæli í Grikkalandi

Nógvir túsund grikkar hava í dag gingið mótmælisgongu ímóti spariuppskotunum, sum stjórnin hevur lagt fram, og sum tjóðartingið samtykti í dag. Samtyktin ber í sær, at tað almenna skal spara í minsta lagi seks milliardir krónur longu í ár fyri at forða fyri, at kreppan, sum landið er í, skal gerast uppaftur verri. Fleiri fakfeløg á tí almenna arbeiðsmarknaðinum høvdu lýst arbeiðssteðg í 24 tímar fyri at mótmæla sparingunum, og seinni í mánaðinum fara fakfeløgini á tí privata arbeiðsmarknaðinum í verkfall.



*Fimm av seks passum útskrivað í 2009 vóru ES-pass, og talið er minkandi hvørt ár*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Grøna passið vekk um 12 ár

**Fyri hvørjar seks íbúgvar, sum fáa nýtt pass í Føroyum, er bert tann eini, sum velur grøna, føroyska passið. Hinir fimm vilja heldur hava tað reyða ES passið, og hvørt ár velja alsamt fleiri grøna passið frá**

PASS
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Grøna, føroyska passið hevur beina leið móti at avtaka seg sjálvt. Tað vísa hagtøl frá Løgregluni, sum umsitur og útvegar pass í Føroyum. Samstundis velja alsamt fleiri at fáa sær eitt reytt ES-pass.

Eftir nógva togan aftur og fram og drúgt kjak gjøgnum fleiri ár, gjørdist tað á vári 1997 møguligt hjá føroyingum at velja, um teir vildu hava eitt reytt danskt ES-pass, ella eitt av grønu, føroysku passunum.

Men nú gott 13 ár seinni, sær tað út sum, at føroyska passið er við at avtaka seg sjálvt so lýðandi, og at tað í alsamt størri mun verður tað danska ES-passið, sum føroyingar helst vilja nýta.

Av teimum 5122 passunum, sum vórðu útskrivað í 2009, vóru bert 722 pass av teimum grønu føroysku, meðan hini 4400 passini vóru tey reyðu donsku ES-passini. Býtið er 16,4 prosent móti 83,6 prosentum.

Hetta merkir tað sama sum, at fyri hvørji seks, sum biðja um pass, biðja fimm um eitt ES-pass og ein um eitt føroyskt pass.

### Støðug gongd

At býtið millum føroysk og ES-pass er so markant er ikki nøkur nýggj støða.

Í 2008 vórðu 5198 reyð ES-pass og 887 grøn pass útskrivað, svarandi til at 17,66 prosent eru grøn, meðan hini 82,34 prosentini vóru reyð.

Árið fyri, í 2007, vóru tað uppaftur fleiri, sum valdu grøna passið. Tá vóru 5404 ES-pass útskrivað, meðan talið av grønum passum var 1107 pass. Tá var prosentbýtið 79,5 prosent reyð pass og 20,5 prosent grøn pass.

### Vekk um 12 ár

Hvør orsøkin til hesa gongdina er, er ilt at gita um. Staðfestast kann tó, at tað ganga nógvar søgur um bæði passini.

Eitt nú siga fleiri, at tey velja tað reyða ES-passið, tí tað skal vera verri at sleppa inn í summi lond við tí grøna passinum. Onnur sigast velja reyða passið, tí tað eru bert »tjóðskaparligir tjóðveldismenn«, sum velja grøna, føroyska passið.

Hinvegin sigur onkur, at meðan Muhammeds-kreppan stóð við, var frægari at hava eitt grønt pass, tí danir vóru í ringum ljósi nógvastaðni í heiminum júst tá.

Men óansæð hvør orsøkin man vera til, at fólk heldur velja at fáa sær reytt pass, kann staðfestast, at við verðandi gongd, har minkingin í býtinum av føroysku passunum er góð 1,36 prosent um árið, verður síðsta føroyska passið útskrivað um góð 12 ár, ella í 2022.

**FAKTA**

## Býtið millum reyð og grøn pass 2007 - 2009

| Ár | Reyð | Grøn | %-reyð | %-grøn |
|---|---|---|---|---|
| 2007 | 5404 | 1107 | 79,52 % | 20,48 % |
| 2008 | 5198 | 887 | 82,44 % | 17,66 % |
| 2009 | 4400 | 772 | 83,59 % | 16,41 % |